www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




# Ítróttaskrivari

**Hevur ítróttur tín áhuga? og dugir tú at skriva? so ert tú kanska júst persónurin, sum vit sóknast eftir.**

Til ítróttaredaktión okkara søkja vit eftir ítróttarskrivara. Høvuðsuppgávan verður saman við ítróttaredaktørinum at røkja eitt av kjarnuøkjunum hjá Sosialinum. Sum miðil hevur Sosialurin í nógv ár havt eina oddastøðu innan føroyskan ítrótt. Bæði á pappíri og alneti. Og verður tað eisini tín uppgáva at halda fast um og menna hesa oddastøðu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving, royndir og førleikar annars til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jákup Mørk á tlf. 341840 ella Jan Müller á tlf. 341831. Sjálvandi ber eisini til at senda teldupost til jakup@sosialurin.fo ella jan@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin til starvið er **fríggjadagin 14. september**, og verður starvið sett sum skjótast eftir hetta. Umsóknin saman við viðkomandi skjølum skal sendast til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*







Starvslýsing

# Løgfrøðingar til Innlendismálaráðið

Innlendismálaráðið søkir eftir tveimum løgfrøðingum. Høvuðsuppgávurnar eru ráðgeving, málsviðgerð og lógarsmíð á teimum økjum, ið ráðið umsitur.

Talan er um fakliga spennandi og fjølbroytt størv, har góðir møguleikar eru fyri viðkomandi eftirútbúgving, Eisini verður møguleiki fyri at arbeiða hjá øðrum viðkomandi myndugleikum og stovnum uttanfyri Innlendismálaráðið.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv, og vera væl fyri málsliga. Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni, arbeiðir sjálvstøðugt og miðvíst. Lesandi, ið vænta at verða liðug í næstum, eru vælkomin at søkja.

Løn og setanartreytir vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF.

Størvini verða sett skjótast gjørligt. Vilt tú hava meira at vita, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 358080.

Umsóknir við CV, prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. september 2007 kl. 12:00.

Umsóknir skulu sendast til:
Innlendismálaráðið
Tinganes
Postboks 159
110 Tórshavn

Í Innlendismálaráðnum starvast í løtuni 15 fólk. Innlendismálaráðið umsitur m.a. lógarmál, kommunumál og umhvørvis-, lendis- og náttúrumál.

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Tel 35 80 80, Faks 35 80 85, Postboks 159
110 Tórshavn imr@imr.fo, www.imr.fo